Barna- og útbúgvingarmálaráðið

Dagfesting:	24/02/2023
Mál nr.:	21/08702
Málsviðgjørt:	SJ/OYS
Ummælistíð:	03/02/2023- 06/02/2023
Eftirkannað:	07.02.2023

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um triðja byggistig í umbygging og útbygging av miðnámsskúlanum á Kambsdali

(Hækka upphæddina, sum landsstýrismanninum verður heimilað at brúka)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 64 frá 4. mai 2022 um triðja byggistig í umbygging og útbygging av miðnámsskúlanum á Kambsdali verður § 1, stk. 2 orðað soleiðis:

"*Stk. 2.* Útreiðslurnar til verkætlanina kunnu í mesta lagi verða 94 mió. kr., íroknað prosjektering, ráðgeving og innbúgv."

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið
Sambært løgtingslóg nr. 64 frá 4. mai 2022 um triðja byggistig í umbygging og útbygging av miðnámsskúlanum á Kambsdali, eru 71 mió. kr. settar av til at umbyggja og útbyggja miðnámsskúlan á Kambsdali íroknað prosjektering, ráðgeving og innbúgv, samsvarandi kostnaðarmetingini hjá Landsverki.

Triðja byggistig er seinasti liðurin í heildarætlanini frá 2012 um út- og umbygging í sambandi við samanlegging av miðnámsskúlunum á Kambsdali. Sambært høvuðsprosjektinum fevnir hesin parturin av verkætlanini m.a. um at nýbyggja náttúruvísindadaliga økið, útbyggja felagsøkið, køkin og undirvísingarhølir, at gera nýggjan brunaveg samsvarandi teimum brunakrøvum, ið Fuglafjarðar kommuna hevur sett, umframt prosjektering, ráðgeving og innbúgv.

Kostnaðarmetingin varð grundað á eitt prosjektuppskot og eitt forprosjekt, tað er, at verkætlanin var ikki bjóðað út, tá ið metingin varð gjørd. Uttanríkis- og mentamálaráðið gjørdi tó av at beina málið um hækkingina upp í 71 mió. kr. fyri Løgtingið í 2022, tí verkætlanin tá var vaksin nógv í vavi og kostnaði í mun til áður galdandi verklagslóg frá 2018. Mett var tískil, at Løgtingið skuldi taka støðu til spurningin, áðrenn verkætlanin varð bjóðað út.

Nú verkætlanin er bjóðað út, og Landsverk hevur gjøgnumgingið innkomnu tilboðini, hevur tað víst seg, at kostnaðarmetingin, sum varð gjørd í sambandi við undanfarnu verklagslóg, var ov lág. Talan er um, at byggikostnaðurin er hægri enn mett, men eisini, at aðrir óbeinleiðis kostnaðir, ið Landsverk metir um, eru hækkaðir, m.a. orsakað av óvissuni á marknaðinum í dag, sum hevur elvt til munandi prísvøkstur.

Sambært útboðstíðarætlanini frá útboðnum í november 2022 skuldi farið verið í gongd við bygging í januar 2023, við avhending av verkætlanini til byggiharran í november 2024. Av tí, at arbeiðstakarin ikki slapp í gongd við arbeiðið til ásettu tíð, má tíðarætlanin fyri verkætlanina dagførast í samráð við arbeiðstakaran.

1.2. Galdandi lóggáva
Galdandi lóggáva er løgtingslóg nr. 64 frá 4. mai 2022 um triðja byggistig í umbygging og útbygging av miðnámsskúlanum á Kambsdali. Sambært § 1, stk. 2 í galdandi løgtingslóg kunnu byggiútreiðslurnar í mesta lagi vera 71 mió. kr.

1.3. Endamálið við uppskotinum
Endamálið við lógaruppskotinum er at hækka upphæddina, sum landsstýrismanninum verður heimilað at nýta til bygging, við 23 mió. kr. úr 71 mió. kr. til 94 mió. kr.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum
Nú verkætlanin hevur verið boðin út, og Landsverk hevur gjøgnumgingið innkomnu tilboðini, hevur Landsverk mett kostnaðin fyri samlaðu verkætlanina at verða 94 mió. kr. íroknað prosjektering, ráðgeving og innbúgv. Tískil er neyðugt at hækka mest loyvdu upphæddina til byggiútreiðslur í verklagslógini samsvarandi núverandi kostnaðarmeting hjá Landsverki.

1.5. Ummæli og ummælisskjal
Uppskotið varð sent Miðnámi á Kambsdali, Landsverki og Fíggjarmálaráðnum til ummælis, og varð uppskotið harumframt lagt fram alment við stuttari hoyringarfreist.

Miðnámsskúlin á Kambsdali fegnast um, at gongd er í málinum um at umbyggja og útbyggja Miðnám á Kambsdali. Miðnámsskúlin skeyt upp, at partar av almennu viðmerkingunum skuldu greinast nærri. Barna- og útbúgvingarmálaráðið tók viðmerkingarnar til eftirtektar.

Landsverk hevði viðmerkingar til útreiðsluprofilin undir í 2.1 í lógaruppskotinum. Barna- og útbúgvingarmálaráðið tók viðmerkingarnar til eftirtektar.

Fíggjarmálaráðið hevði ikki beinleiðis viðmerkingar til uppskotið, men er uppskotið annars fyrireikað í samstarvi við Fíggjarmálaráðið og Landsverk.

Ongar aðrar viðmerkingar vóru til uppskotið.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Verkætlanin hevur verið bjóðað út, og við støði í innkomnu tilboðunum metir Landsverk, at samlaði byggikostnaðurin verður í alt 94 mió. kr., íroknað prosjektering, ráðgeving og innbúgv.

Frá 2018 til 2022 eru brúktar 7,8 mió. kr. til fyrireiking og prosjektering. Í 2023 eru játtaðar 12,2 mió. kr., umframt at 8,3 mió. kr. eru fluttar frá 2022, tilsamans 20,5 mió. kr. Í 2024 skulu játtast 49,2 mió. kr. og síðani 16,5 mió. kr. í 2025, men annars verður verkætlanin framd sambært játtanum veittum í fíggjarlógini.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Mett verður ikki, at uppskotið ber í sær umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunu.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Uppskotið ber við sær økt virksemi fyri byggivinnuna í byggitíðarskeiðnum.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Uppskotið hevur ongar avleiðingar fyri umhvørvið.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Um- og útbyggingin fer at hava eina jaliga ávirkan á virksemið á staðnum, bæði í byggitíðarskeiðnum og ikki minst, tá um- og útbyggingin verður liðug.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Uppskotið hevur ongar avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Uppskotið hevur ongar avleiðingar fyri nakrar millumtjóðasáttmálar.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Uppskotið hevur ongar avleiðingar fyri tvørgangandi millumtjóðasáttmálar.

2.9. Markaforðingar
Uppskotið hevur ongar kendar markaforðingar við sær.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um revsing, útpanting, sektir ella onnur størri inntriv.

2.11. Skattir og avgjøld
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um skattir ella avgjøld.

2.12. Gjøld
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um gjøld.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Lógaruppskotið áleggur ikki fólki skyldur.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Lógaruppskotið heimilar landsstýrismanninum at nýta upp til 23 mió. kr. til at umbyggja og útbyggja miðnámsskúlan á Kambsdali, prosjektering, ráðgeving og innbúgv íroknað.

Upphæddin á 23 mió. kr. kemur afturat teimum 71 mió. kr., sum galdandi løgtingslóg heimilar landsstýrismanninum at nýta, í alt í mesta lagi 94 mió. kr., íroknað prosjektering, ráðgeving og innbúgv.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Lógaruppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar.

2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Ja
Umsitingarligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar			Nei	Nei	

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

Til § 1
Broytingin av § 1, stk. 2 í løgtingslógini ber við sær, at mesta upphæddin, ið landsstýrismanninum verður heimilað at nýta til um- og útbygging av miðnámsskúlanum á Kambsdali, verður hækkað úr 71 mió. kr. til 94 mió. kr., svarandi til eina hækking upp á 23 mió. kr.

Somuleiðis framgongur tað nú greitt av lógartekstinum, at samlaða upphæddin til verkætlanina upp á 94 mió. kr. er íroknað prosjektering, ráðgeving og innbúgv. Hetta ber tó ikki við sær nakra broyting í mun til økta verkætlanarkostnaðin, tí útreiðslur til prosjektering, ráðgeving og innbúgv eru longu við í samlaða verkætlanarkostnaðninum sambært viðmerkingunum til galdandi løgtingslóg.

Til § 2
Løgtingslógin fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Barna- og útbúgvingarmálaráðið, 24. februar 2023

Djóni Nolsøe Joensen
landsstýrismaður

/ Poul Geert Hansen

Yvirlit yvir fylgiskjøl:
Fylgiskjal 1: Javntekstur
Fylgiskjal 2: Hoyringarsvar frá Landsverki
Fylgiskjal 3: Hoyringarsvar frá Miðnámsskúlanum á Kambsdali
Fylgiskjal 4: Landsverk – Lýsing av verkætlan 2021
Fylgiskjal 5: Landsverk – Útboðstíðarætlan 2022
Fylgiskjal 6: Landsverk – Rúmskrá
Fylgiskjal 7: Landsverk – Byggiskrá 2018
Fylgiskjal 8: Landsverk – Samband milum virkisøkini